| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Við veingjum (ryggskjóldur á klukkum og líknandi verður eisini roknað sum veingir). | 2 | |
| - | Uttan veingir, ella í mesta lagið sera lítlar veingjalepar. | 12 | |
| 2 | Allir veingir tunnir. | 3 | |
| - | Í minsta lagið fremra parið hart ella leðurlíkt (sum t.d. ryggskjóldur á klukkum). Aftara parið er tunt ella manglar. | 9 | |
| 3 | Eitt par av veingjum (t.d. Diptera). | 4 | |
| - | Tvey pør av veingjum (t.d. hjá klukkum, har eitt par eru ryggskjóldur og eitt par er vanligu veingirnar sum liggja undir hesum). | 5 | |
| 4 | Sera lítil skordýr (5 mm), ein ella fleiri stuttar halar, antennur nógv longri enn høvdið. | Hemiptera:Coccoidea |  |
| - | Framveingir vanligir. Ístaðin fyri afturveingir eru lítlar knappanálslíkar "haltere", hjá størri sløgum kunnu hesar vera fjaldar undir lepum á forveingjum. Antennur ofta stuttar og bustskapaðar. | Diptera, flugur |  |
| 5 | Sera lítil skordýr við fjøðurlíkum veingjum, sum oftast verða hildnir tætt at kroppinum. | Thysanoptera |  |
| - | Veingir lagdir við smáum flusi ella hárum. | 6 | |
| - | Veingir ikki lagdir við tættum flusi ella hárum, hóast æðrarnar kunnu vera lodnar, veingir oftast litleysir og klárir. | 7 | |
| 6 | Veingir lagdir við flusi, ofta sera litfagrir, ofta sæst ein samanrullaður sevil. | Lepidoptera, firvaldar |  |
| - | Veingir lodnir, oftast brúnir onkuntíð svartir, í hvílu liggja teir sum eitt tak yvir kroppin, fáar tværæðrar, antennur peika frameftir, afturveingir oftast breiðari enn framveingir, ikki samanrullaðan sevil. | Trichoptera, várflugur |  |
| 7 | Veingir við tøttum æðraneti og nógvum tværæðrum. | Neuroptera:*Chrysopa carnea* |  |
| - | Veingir við einans fáum tværæðrum. | 8 | |
| 8 | Sera lítil skordýr, ofta við lodnum veingjaæðrum og møguliga nakað av flusi, æðramynstri sermerkt, veingir settir sum tak í hvílu, antennur lutfallsliga langar við minst 12 liðum. | Psocoptera |  |
| - | Sera lítil ofta peruskapaði skordýr við súgvisevili, veingir oftast settir sum tak í hvílu, men flatar hjá nøkrum sløgum, antennur við í mesta lagið 10 liðum, ofta eru tvey rør omaná bakkroppinum. | Hemiptera:Aphidoidea, blaðlýs | |
| - | Sera lítil til stór skordýr, afturveingir nógv minni enn frammveingir, veingir oftast við stórum meskum, men hjá smærri sløgum kunnu æðrarnar vera nógv minkaðar (so meskarnir ikki síggjast), veingir ongantíð sum eitt tak. | Hymenoptera |  |
| 9 | Framveingir uttan æðrar, møtast mitt á uttan at leggjast útyvir hvønn annan. | 10 | |
| - | Framveingir við æðrum, leggjast antin útyvir hvønn annan ella eru settir sum tak. | 11 | |
| 10 | Framveingir stuttir, næstan fýrakantaðir, meginparturin av afturkroppinum sjónligur, kløður aftast á afturkroppinum. | Dermaptera:*Forficula auricularia* , tvísterta |  |
| - | Framveingir sera harðir, liggja oftast (men ikki altíð) yvir allan afturkroppin, ongar kløður aftast á afturkroppinum | Coleoptera, klukkur |  |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11 | Framveingir tunnir aftan, liggja flatir yvir afturkroppin í hvílu, ein tunnur súgvisevil sæst. | Hemiptera:Heteroptera, tekur |  |
| - | Framveingir rættiliga eins allastaðni, vanliga sæst ikki ígjøgnum teir (men tað kemur fyri), væl harðari enn afturveingirnar, sum tak í hvílu, ein klænur sevil sæst, hava lætt við at hoppa um tær verða órógvaðar. | Hemiptera:Auchenorrhyncha, Sprettur og Heteroptera:Psylloidea, Blaðloppur |  |
| 12 | Við langum tunnum halum í afturendanum. | 13 | |
| - | Mjá bleik dýr í moldini, føturnar hava ein lið,við tong í afturendanum. | Diplura: Japygidae | |
| - | Við stuttum halum ella als ongum hala. | 14 | |
| 13 | Tveir halar, eingi eygu, lítil bleik djór í moldini. | Diplura | |
| - | Lítil, hoppandi skordýr við ongum veingjum, afturendin hevur | Collembola, hoppstertur |  |
| - | Tríggir halar, gráflekkut skordýr, sum síggjast mest í fjøruni og hava lætt við at hoppa | Archaeognatha:*Petrobius maritimus* |  |
| - | Tríggir halar, silvurskyggjandi slag, sum sæst inni í húsum | Zygentoma:*Lepisma saccharina*, silvurfiskur |  |
| 14 | Mjá, bleik djór í moldini, eingi eygu, frambeinini ikki stórvaksin. | Diplura: Projapygidae |  |
| - | Lítil, skordýr við ongum veingjum, afturendin hevur møguliga ein tvídeildan hala, sum kann liggja undir kroppin. | Collembola, hoppstertur |  |
| - | Kroppurin við flusi ella fløtum hárum, farvegurin eftir veingjum sæst. | Honirnar hjá onkrum sløgum av Lepidoptera, firvaldar | |
| - | Smælkar týðiliga fremst á afturkroppinum (týðiliga miðju), miðjan hevur ofta ein flusutan vøkstur, antennur við knekki á. | Hymenopera:Formicidae, meyrur og nøkur sløg av Hymenoptera, vespur |  |
| - | Fløt skordýr við lutfallsliga breiðum høvdi, antennur langar og klænar, afturlærið ofta stórt, ofta innandura í turrum matvørum og tílíkum. | Psocoptera, bóklýs |  |
| - | Lítil peruskapaði skordýr, høvdi nógv smalari enn kroppurin, ein sevil undir høvdinum, ofta eitt par av rørskapaðum vøkstrum á afturkroppinum, livur á grønum plantum. | Hemiptera:Aphidoidea, blaðlýs | |
| - | Sníkar á fuglum og súgdjórum. | 15 | |
| 15 | Kroppurin samankleimdur frá síðuni, hoppandi oftast brún skordýr við langum bakbeinum. | Phthiraptera:Siphonaptera, loppur |  |
| - | Kroppurin samankleimdur frá rygginum. | 16 | |
| 16 | Høvdið fellur lutvíst inn í miðkroppin. | 17 | |
| - | Høvdið fellur ikki inn í miðkroppin. | 18 | |
| 17 | Antennur meir ella minni goymdar í lægdum, beinini nokkso stór, ofta við tveimum sterkum klóm. | Diptera: *Melophagus ovinus*, førilús og *Ornithomya chloropus*, ein fuglalús |  |
| - | Antennur síggjast væl, bein klænri enn hjá flugum, klørnar ikki so týðiligar. | Hemiptera:*Cimex lectularius*, veggjalús |  |
| 18 | Sera lítil avlang ella eggjaskapaði skordýr, høvdið næstan líka breitt sum kroppurin, frambringan skilist frá, føtur við einum ella tveimum klóm, bítandi munnpartar. | Phthiraptera, lýs (skinn- og fjarðalýs) |  |
| - | Sera lítil peruskapaði skordýr, høvdið nógv smalari enn kroppurin, bringupartarnir sum ein heild, føtur við einari stórari klógv, súgvandi munnpartar. | Phthiraptera, lýs ("vanligar" lýs) |  |